SKÚLIN VIÐ STREYMIN

Oyrarbakki - desember 2018

Jólabræv til næmingar og foreldur í 6. flokki

"Jólavinurin"

Í desember hava allir næmingarnir í flokkinum ein loyniligan jólavin. Uppgávan er so, at gera tað so gott, sum til ber hjá jólavininum, men uttan at hann veit av hvør ger tað.

19. desember skulu vit gita hvør er okkara jólavinur.

"jólaposin"

Aftur í ár gera vit ein jólaposa, sum loyniligi jólavinurin skal leggja góðgæti í (kr. 25,-).

Góðgæti skal leggjast í posan friggjamorgunin 14. des ella mánamorgunin 17. des.

Her ræður um at finna júst tað tín jólavinur dámar væl.

19. desember lata vit jólaposan upp.

Ætlanir fyri desember í skúlanum

Her er ætlanin fyri desember í skúlanum – teir dagar har einki er viðmerkt er vanligur skúladagur.

Um so er at onkrar broytingar eru, so skal eg leggja tær í vikuseðilin.

30. nov.	Heingja jólapynt upp í floksstovuni.
3. des.	Vanligur skúladagur, har vit venja leik í 3., 4. og 5. tíma. Í dag skulu øll hava leikabúnarnar við.
4. des.	Vanligur skúladagur, har vit venja leik í 3. og 4. tíma.
5. des,	Ein skúladagur har øll fyríreika seg til jólahaldið. Tey fara heim kl. 12.35. Jólahaldið er kl. 17 í Eydnuni. Næmingarnir møta bara beint áðrenn. Tó skulu Sílas og Victoria møta kl. 16.30. Aftaná framførslurnar í Eydnuni bjóðar skúlastýrið ein drekkamunn í floksstovuni.
6. des.	Frídagur hjá grund- og miðdeild
10., 11. og 12. des	Jólaverkstøð – heim kl. 11.20
13. des.	Vanligur skúladagur – fara heim kl. 11.20
14. des.	Jóalverkstøð – fara heim kl. 11.20
19. des.	Í 2. og 3. tíma er jólahugni í flokkinum – annars vanlig skúlagongd.
20. des.	Møta kl. 9 – dansa jólatræ. Kl. 10 er guðstænasta í kirkjuni við Norðskála. Bussurin koyrir heim beint eftir guðstænastuna.

Eg ynski tykkum øllum eina gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár.

Vit møta aftur í skúla 7. januar kl. 8.

Vinarliga Thordis